## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið upp í andøvsgul av norði. Okkurt ælið, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin upp í ein strúk. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur av vestri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin frískar hann vindin av landsynningi og seinnapartin regn. Týsdagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Nú kann Randi giftast

Leygardagin verður stórur dagur í lívinum hjá Randi Olsen í Havn. Tá skal hon nevniliga standa brúður í Havnar Kirkju undir liðini á manni sínum, Richardi Jacobsen úr Klaksvík.

Hesa stórhending vildu vinfólk hennara ikki lata fara aftur við borðinum uttan markering, og tí gjørdu tær ikki mætari, enn at »kapra« hana seinasta fríggjadag.

Dagurin byrjaði við boblubaði og viðgerð, áðrenn tær fóru á matstovuna Merlot at eta eina bita á middegi.

Seinnapartin bowlaðu tær saman, áðrenn stuttleikabáturin »Pearl« flutti tær allar út í Hest, har tær steðgaðu eina løtu.

Um kvøldið fóru tær enn einaferð á Merlot at eta, og gingu síðani runt í býnum og tosaðu við tey, sum gingu framvið teimum.

Sum skilst var hetta ein sera góður dagur, ið má metast sum ein fyrireiking til stóru festina leygardagin.

sb




*Komandi brúðurin, Randi Olsen (triðuttast høgrumegin) og vinkonur hennara hugnaðu sær fríggjadagin, millum annað við einum túri umborð á stuttleikabátinum Pearl*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað. Eitt annað lágtrýst, 1010 hPa. við Hvarvið fer eystureftir og dýpist nakað.



**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer eystureftir

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/07 kl. $06^{00}$ – 14/07 $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 13/07 kl. $06^{00}$ – 14/07 $06^{00}$.
Avfallið higartil í juli: 51 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli Fyrra kvarter
14. juli Mánin longst frá jørðini
18. juli Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. juli | 6:49 | 19:12 | 5:49 | 18:12 | 6:04 | 18:27 | 8:49 | 21:12 | 9:49 | 22:12 | 5:04 | 17:27 | 4:04 | 16:27 | 7:04 | 19:27 | 8:04 | 20:27 | 6:34 | 18:57 | 7:49 | 20:12 |
| 18. juli | 7:36 | 19:57 | 6:36 | 18:57 | 6:51 | 19:12 | 9:36 | 21:57 | 10:36 | 22:57 | 5:51 | 18:12 | 4:51 | 17:12 | 7:51 | 20:12 | 8:51 | 21:12 | 7:21 | 19:42 | 8:36 | 20:57 |
| 19. juli | 8:18 | 20:38 | 7:18 | 19:38 | 7:33 | 19:53 | 10:18 | 22:38 | 11:18 | 23:38 | 6:33 | 18:53 | 5:33 | 17:53 | 8:33 | 20:53 | 9:33 | 21:53 | 8:03 | 20:23 | 9:18 | 21:38 |
| 20. juli | 8:59 | 21:18 | 7:59 | 20:18 | 8:14 | 20:33 | 10:59 | 23:18 | 11:59 | - | 7:14 | 19:33 | 6:14 | 18:33 | 9:14 | 21:33 | 10:14 | 22:33 | 8:44 | 21:03 | 9:59 | 22:18 |
| 21. juli | 9:38 | 21:57 | 8:38 | 20:57 | 8:53 | 21:12 | 11:38 | 23:57 | 0:18 | 12:38 | 7:53 | 20:12 | 6:53 | 19:12 | 9:53 | 22:12 | 10:53 | 23:12 | 9:23 | 21:42 | 10:38 | 22:57 |

Lesið
Sosialin